lívdin
- í lívd hins hægsta

September 2007



# Bjørg og Marita til Noregs



**Bjørg Clementsen**



**Marita Jøkladal**

20. august fór Bjørg Clementsen í Hoyvík til Norra at ganga á "Veien Bibelskole" í Bergen. Bjørg sigur, at á skúlanum verður undirvíst frá mánadegi til hósdag. Fríggjadag er ymiskt annað á skránni. Lærararnir á skúlanum eru virknir pastorar og samkomuleiðarar. Harumframt koma gestalærarar á skúlan at undirvísa. Bjørg er 16 ára gomul og fer at ganga á skúlanum í eitt ár.

Marita Jøkladal verður komandi árið við í einum toymi, ið hevur til endamáls at røkka ungfólk í Europa. Fyrstu fýra mánaðirnir fara til venjing og bíbliugranskan, og restin av árinum - inntil august komandi ár - verður evangeliserað ymsastaðni í Noregi og í Europa annars. Felagsskapurin er "Jesus Revolution" við heimstaði í Oslo.

Tað er hugagott at síggja ungdóm brenna fyri, at fólk verða leidd til Harran. Tað hevur eisini stóran týdning, at ungdómurin sjálvur er við til at vinna onnur ung í Europa. Tí gleðast vit, at farið verður út um landoddarnar við evangeliinum, serliga til at røkka tað uppvaksandi ættarliðið. Jesus sigur í Matteus 9:37 við lærisveinar sínar: "Skurðurin er stórur, men arbeiðsmenninir eru fáir."

**Minnist til at siga okkum frá!**

Vit heita á øll í samkomuni at siga okkum frá, um okkurt er, sum tit ynskja at fáa við í faldaran, eitt nú børn, ið verða fødd, brúdleyp, gullbrúdleyp og annað.

Í sambandi við rundar føðingardagar, skriva vit ein stubba um fólk í samkomuni, sum fylla 50, 60, 65, 70, 75, 80, 85, 90, 95 og 100 ár.

Teldupostadressan er: faldarin@livdin.fo

## Sorg er partur av lívi okkara



Sorg er partur av lívi okkara her á jørð – eisini í lívi hins trúgvandi. Mong í samkomufamilju okkara hava kent sorg fyrr, fleiri kenna sorg nú, og fleiri fara at kenna sorg framyvir. Eingin okkara er undantikin. Vit fara øll á ein ella annan hátt at kenna sorg. Mer hvør gott er tað ikki at hoyra troystarríku orð Jesusar til okkara í slíkum tíðum: "Sæl eru tey, sum syrgja; tí tey skulu verða troystað" (Matt. 5:4). Hetta er Jesusar lyfti til tykkara, sum kenna sorg – Hann skal troysta tykkum! Gævi, vit lærdu at søkja troyst hjá Honum, og máttu vit lært at troysta hvør annan sum brøður og systrar.

*Jógvan Zachariassen*

# Vinir í Lívdini



Tann 16. juli 2007 fekk Jóhan Syderbø, Hoyvík, MSc prógv í verkætlanarleiðslu frá The University of Greenwich, School of Architecture and Construction í London.



Tann 9. juni 2007 fekk Fríða av Fløtum Jensen B.Sc. (Hons.) prógv í sálarfrøði frá Newcastle Universiteti í Onglandi.

### Tillukku við hjúnabandinum



29. juni 2007 giftust í Havn Sólvá Heinadóttir, Norðragøtu, og Álvur Kirke, Kaldbak

### Tillukku við barninum

10. mai fingu Gudny og Brian Rasmussen, Kaldbak, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 4000 gr.

15. juni fingu Jóhanna og Mortan Rasmussen í Kollafirði ein son, sum eitur Silas. Hann var 53 cm langur og vigaði 4300 gr.

18. juli fingu Ilda og Rúni Lómstein í Kollafirði eina dóttur, sum eitur Olivia. Hon var 54 cm long og vigaði 3850 gr.

21. august fingu Siri og Jens Kristian Davidsen, Signabø, eina dóttur, sum eitur Tina. Hon var 54 cm long og vigaði 3900 gr.



## Lítli Rói komin heim



Mikudagin 25. juli andaðist Rói Andreasen, bert 5 ára gamal. Rói var sonur Jóhonnu og Boga Andreasen, bæði úr Klaksvík, men búsitandi í Havn.

Rói varð føddur 27. august 2001, dagin eftir at Lívdin hevði sítt fyrsta almenna møti sunnudagin 26. august. Rói hevði Down's syndrom, og hetta var ein stór avbjóðing fyri foreldrini, sum uppaldu hann á ein fyrimyndarligan hátt.

Róa dámdi væl í sunnudagsskúlanum, serliga væl dámdi honum sangir, sum tekn skuldu gerast til. Undir jarðarferðini í Ebenezer ólavsøkuaftan sungu børn úr sunnudagsskúlanum í Lívdini, og ein myndarøð við myndum av Róa varð víst á stórskíggja. Jógvan Zachariassen helt eina eitt sindur øðrvísi og hugvekjandi talu, har hann læt Róa siga frá, hvussu tað er at vera heima í Himli.

Vit minnast Róa við takksemi. Hann verður nógv saknaður av okkum øllum.

### Lívdin til Zarepta




Vikuskiftið 2. til 4. november verður samkomu-lega hjá Lívdini á Zarepta.

Har verður eisini dópur. Undan leguni verður skipað fyri skeiði um dóp.

### Hjúnabandsskeið á Hotel Norð

Leygardagin 6. og sunnudagin 7. oktober skipar Lívdin fyri hjúnabandsskeiði á Hotel Norð á Viðareiði. Talan er um eitt sonevnt PREP-hjúnabandsskeið.

### Ungdómsmøtini aftur í skúlanum

Í summarsteðginum vórðu ungdómsmøtini í Lívdini hildin saman við Ebenezer. Nú eru ungdómsmøtini aftur í Skúlanum í Hoyvík fríggjakvøld kl. 21.00.

# Tiltøk

## TILTØK Á BREKKU 3

(bygningurin aftan fyri MBM)



**Undirvísing, bøn og bønarskúli** **týskvøld kl. 20.00**

4. september. Húsbólkar (eingin bønarskúli)
11. september. Bønarskúli
18. september. Bønarskúli
25. september. Húsbólkar (eingin bønarskúli)

## Regin Guttesen vitjaði



Sunnudagin 19. august vitjaði Regin Guttesen, trúboðari í Campobosso í Italia, í Lívdini. Regin talaði m.a. um at tilbiðja Gud fyri tað, Hann er, og ikki einans fyri tað, Hann ger ella ikki ger fyri okkum. Ein hugvekjandi tala. Regin var á stuttari vitjan í Føroyum, meðan konan Heidi og sonurin Noah vóru í USA.

## Lívdin 6 ár



Sunnudagin 26. august varð hátíðarhildið, at 6 ár vóru liðin, síðan fyrsta almenna møtið hjá Lívdini varð hildið í verkhúsinum "Virkni" á Berjabrekku í Havn.

# Skráin fyri møtini í Hoyvíkar skúla



### Sunnudagin 2. sept

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Hjartamál: Samrøða við fólk í Lívdini (Christmas Child)* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Síggið markirnar*<br>*Talari: Ólavur Jøkladal* |

### Sunnudagin 9. sept

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Hjartamál: Samrøða við fólk í Lívdini. (Signing av børnum)* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Rómbrævið (8:30-34).*<br>*Talari: Jógvan Zachariassen* |

### Sunnudagin 16. sept

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Hjartamál: Samrøða við fólk í Lívdini* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Hvar er Gud?*<br>*Talari: Símun Absalonsen.* |

### Sunnudagin 23. sept

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Hjartamál: Samrøða við fólk í Lívdini* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Rómbrævið (8:35-39).*<br>*Talari: Jógvan Zachariassen.* |

### Sunnudagin 30. sept

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Hjartamál: Samrøða við fólk í Lívdini (Signing av børnum)* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Rómbrævið (1-8).*<br>*Talari: Jógvan Zachariassen.* |

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni.*

*Útgevari: Samkoman Lívdin – www.livdin.fo · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson · Teldupostur: faldarin@livdin.fo*